


*Nr. 19* *20. september 2015* *75. árg.*

# Heyst

*Grasið visnar, blóman følnar, men orð Guds várs stendur allar ævir.*
*Jes. 40,8.*

Orð Guds várs stendur allar ævir. Tak hesi orðini uppaftur! – Alt umskiftist og ridlar; alt visnar og ferst; alt er undirgivið deyðans lóg, og har er ongin munur. Eina stutta tíð eru vit her, og skjótt eru dagar okkara taldir. Lívið gongur víðari, tá ið støv okkara er fjalt undir moldum. Grasið visnar, og blóman følnar; hetta er sannleikin um alla dýrd okkara. Meira kunnu vit ikki siga. Vága vit okkum at siga meira, eru vit í dreyma- og fantasiverðini.

Men sum tað er gott, at her er meira at siga. Ikki av okkum, men av Gudi. **Orð Guds várs stendur allar ævir!** Lívliga kjakið millum gudfrøðingar, óhugnaliga líkasælan millum menniskju og tey mongu spurnartekini, sum vit loyva okkum at seta! Alt hetta vikar ikki Guds orð. Tað verður standandi!

Tá ið eitt menniskja inniliga biður: "Tala, Harri, tí tænari tín hoyrir!" so hevur Gud eitt orð at siga. Men bara tann, sum tegir, lurtar og bíðar, hoyrir boðskapin.

Guds orð fer ígjøgnum tjúkku múrarnar, sum vit royna at fjala okkum aftanfyri. Tað avdúkar okkum og lærir okkum at síggja støðu okkara sum teir glataðu skuldarar, ið vit eru. Men tað dregur okkum inn til Guds og kveikir fyri okkum eitt ljós, sum aldri missir megi sína. Orðið er boðað okkum gjøgnum evangeliið, sigur Pætur, og evangeliið merkir ein gleðiligur boðskapur. Gud vil hava okkum í talu ígjøgnum orðið og draga okkum inn at ljósinum.

Summmi hava eina hóming av, at ljósið er til, men tey liva í eini skýming. So sterkur er hin Óndi. Guds orð er eitt óvikiligt orð. Vit eru veik og falla ferð eftir ferð; men um tað so er fyri túsundu ferð, at vit koma til hansara við okkara niðurløgum og stúranum, so tekur hann ímóti okkum við opnum ørmum. Har fáa vit at vita, at Guds miskunn ikki er uppi. – Hoyr orð Harrans! Lurta eftir tí! Gríp tað! Lat tað galda! Av Harrans orði skulu vit liva. Eina tað frelsir! Land, land, hoyr orð Harrans!

*Skjótt endar henda stutta jarðarstund,*
*tá fánar dýrdin øll við heimsins sund.*
*Alt ridlar leyst, sum eyga mítt kann sjá,*
***o, tú, sum broytist ei,** ver tú mær hjá!*

*Mær tørvar tína hjálp hvønn lívsins dag.*
*Bert náði tín kann doyva fjandans slag.*
*Hvør er sum tú? Í ódn og sólskinsbrá*
*mín stavur og mín stuðul, ver mær hjá!*

# Ritaður eri eg í tínar hendur

*Sí, í mína hond havi eg rist teg, borgargarðar tínir eru mær altíð fyri eyga.*

*Jes. 49,16.*

Á, sum tað uggar eitt mótleyst hjarta at vita, at okkara kæri frelsari minnist okkum! So mangan ert tú, mín Jesus, burtur úr huga og sinni mínum.

Stundum villist eg langt burtur frá tær, langt inn í heimsins gaman; men eygu tíni síggja meg, friðarhugsan tín røkkur mær, altíð hugsar tú um meg. Gjørdist eg ótrúgvur, ert tú trúgvur. Ja, hvussu mangan hevur tú ikki borið meg aftur av mínum egna vegi.

Takk fyri, at tú soleiðis vilt hugsa um meg, vaka yvir fótafetum mínum. Legg kærleika tín alt djúpari í sinni mítt, so eg fúsur kann taka upp kross tín og seta æru tína sum hægsta endamál mítt.

*Ritaður eri eg í tínar hendur -*
*ein dag eg síggja teg skal, sum tú ert.*
*Síggja eg skal tínar blóðstungnu hendur.*
*- Jesus tað var alt tín kærleiki bert.*

*t.* týddi.

# Bið um fyrigeving

*”Ver skjótur til sættis við mótstøðumann tín,” Matt. 5,25.*

Viðhvørt sleppur tú frá tínum særdu kenslum, um tú sættist við mótstøðumann tín. Og um tú ert villig til tað, fer Gud at hjálpa tær. George Eliot (dulnevni fyri Mary Anne Evans) skrivaði: ”Á, henda óskiljandi gleðin, at kenna seg trygga við eitt annað menniskja. At tær hvørki nýtist at viga tankar ella orð, men kanst sleppa øllum – bæði øgnum og kjarnum, og tú veitst, at ein trúføst hond fer at grípa tey og hyggja gjølla at teimum. Hon fer at varðveita tað, sum er vert at varðveita, og so við einum kærleiksfullum blástri blæsa restina burtur.”

Ein universitets-professari undirvísti í, hvussu høgur prísurin er, um tú ikki vilt fyrigeva. Hann bað allar næmingarnar taka ein posa við eplum við sær. Fyri hvønn persón, sum teir ikki kundu fyrigeva, skuldu teir velja sær eitt epli. Á hetta eplið skuldu teir skriva dato og navnið á viðkomandi. So skuldu teir, uttan at svika, bera henda eplaposan við sær allastaðni í ein heilan mánað. Tá ið teir høvdu dragsað posan í eina tíð, fóru næmingarnir so smátt at síggja, hvussu tunga vekt, teir sleipaðu við sær, og hvussu nógva orku, tað kostaði, at hava atlit til henda posan, og hvussu varnir, teir máttu vera ikki at gloyma hann á einum skeivum staði. At enda, tá ið eplini fóru at rotna og stinka, skiltu teir, at skilabest var at sleppa sær av við hesi eplini.

Jesus segði: ”Um tit fyrigeva monnum misgerðir teirra, so skal himmalski faðir tykkara eisini fyrigeva tykkum; men fyrigeva tit ikki monnum, so skal faðir tykkara ikki heldur fyrigeva misgerðir tykkara.” Matt. 6,14-15. Um tú fyrigevur eina synd, so er hon burtur med alla – um tú ikki fyrigevur, hvat skalt tú so gera við hana? Hatta er ein góður spurningur. Vilt tú fegin, at Gud fyrigevur tær á sama hátt, sum tú fyrigevur øðrum? Um tú verður illa til passar av hesari hugsan, so mást tú taka tær um reiggj og gera okkurt við tað!

”… et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

---

At vera kristin er ikki “at taka seg saman”, men “at falla saman”, so Jesus kann sleppa framat. Alt, sum Gud krevur av mær, gav hann mær av náði.

*e.c.* ums.

# Ein týðandi spurningur

William E. Gladstone var í seinna partinum av nítjandu øld forsætisráðharri í Bretlandi í fýra valskeið. Hann er ein av teim best dámdu forsætisráðharrunum, ið Bretland hevur havt. Gladstone segði, tá ið hann arbeiddi við gerandisdagsins spurningum: “Tað er bara ein spurningur, sum er týdningarmikil, og tað er Guds vilji. Hann er svarið til allar hinar spurningarnar.”

Ein slík útsøgn fær meg at biðja: “Harri, verði vilji tín ikki bara í himlinum men eisini á jørðini. Ikki bara í heiminum, men eisini við mær og ígjøgnum meg.”

Tað má verða ein bøn eftir Guds vilja, at Guds vilji hendir, so at alt annað fellur upp á pláss. Í Guds orði lesa vit: *“Og hetta er tað treystið, sum vit hava til hansara, at um vit biðja um okkurt eftir vilja hansara, tá hoyrir hann okkum.” (1. Jóh. 5,14).*

# Chipsið

Tá ið Jóhannes var á oynni Patmos, sá hann inn í framtíðina, og tískil sá hann mangt, sum hann ikki visti, hvat ið var. Hann mátti so greiða frá tí í myndum. T.d. sá hann teknologiina. Hann sá, hvussu eingin kundi keypa og selja uttan tann, ið hevði djórsins merki, tess navn ella tess tal. Opb. 13,16-18. Hetta er chipsið, sum tey fáa skurðviðgjørt inn undir húðina á høgru hond sína ella pannuna.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20. sept. | Tekstur: | Matt. 6,10a og 13,4-9+19-23; | bíbliuorð: | Mark.1,15a |
| 27. sept. | Tekstur: | Matt. 6,10b og 26,36-39; | bíbliuorð: | Sálm. 37,5 |
| 4. okt. | Tekstur: | Matt. 6,11-33 og 2. Mós. 16,1-36; | bíbliuorð: | Matt. 6,33 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 20* *4. oktober 2015* *75. árg.*

# Berið byrðar hvør hjá øðrum

*Ella teir átjan, sum tornið í Siloam datt oman yvir og varð at bana, halda tit, at teir vóru sekari enn alt hitt fólkið, sum býr í Jerusalem?*

*Luk. 13,4*

Líðingargátuna duga vit ikki at loysa. Latið okkum vera ærlig og viðganga tað treytaleyst.

Átjan fólk doyðu, tá ið eitt torn rapaði oman yvir tey, og beinavegin vóru tað nøkur, sum hugsaðu, at okkurt í lívinum hjá hesum átjan hevði ikki verið livað rætt. Júst somu hugsan møta vit í dag. Vit gera óivað tað sama. Hvat havi eg gjørt, at eg skal revsast so harðliga? Tey, sum spyrja soleiðis, seta seg uttan fyri møguleikan at fáa ta hjálp, sum teimum tørvar.

Líðingargátuna duga vit ikki at loysa. Men Gud kemur okkum á møti við sjálvur at fara inn í líðingina. Jesu krossur er Guds svar til øll, sum spyrja um veg, og ikki minst til teirra, sum støðd eru í líðingar-myrkrinum. Okkara mongu spurningar, hví hetta kemur og hví hatta kemur, verða yvirdoyvdir av Jesu rópi á krossinum: "Gud mín, Gud mín! Hví fór tú frá mær?

Men vit gerast málleys, tá ið vit skulu ugga. Medmenniskjaliga samkenslu kunnu vit royna at bera fram, men latið okkum vara okkum fyri at koma við eini forkláring. Líðing, sorg og ótti fylla alt, og orð okkara rína mangan ikki við og kunna gera ilt verri. Tað er eyðmýkjandi at sita hjá einum, sum líður. Púra hjálparleysan kann man kenna seg yvir fyri tí, sum hevur mist, og sum situr har stúrin og tungur í huga. Hvat skal ein siga? Og hvat skal ein gera? Ikki er neyðugt at siga nakað. Tú kanst t. d. seta teg undir liðina á tí syrgjandi og halda í hondina

á honum/henni og syrgja saman við viðkomandi. Eitt annað, sum vit eisini kunnu gera, er at taka eitt slíkt menniskja við inn í forbøn okkara. Túsund ferðir virðismiklari enn bíligar frágreiðingar er ein innilig bøn.

Skulu vit kunna bera byrðar hvør hjá øðrum, mugu vit venjast í trupla kynstrinum at vera áhaldindi í bønini og so annars lata spurningin um sambandið millum lagnu og skuld standa ósvaraðan.

*Mær, Harri, unni*
*at tæna eina tær*
*við sál og munni,*
*sum orð títt loyvir mær;*
*um verðin rívur*
*mítt hold sum nota stinn,*
*um sjúka nívir,*
*so gev mær tol í sinn'!*
*Inntil tað lívir*
*har, tú meg leiðir inn.*

*Har troyst eg finni,*
*har tregi, sorg og neyð*
*ei nerva minni,*
*og deyðans rót er deyð;*
*eg gloymi glaður*
*hvønn vanda, sum nú er,*
*og allar ævir*
*eg inni takkargerð,*
*har moldarmaður*
*við einglum lovsong ber.*

# Styrkin, sum okkum tørvar

Enski biskupurin, Hugh Latimer, sum livdi í 16. øld, talaði mangan harðliga ímóti sosialum órættvísi. Tí varð hann tikin og settur sum fangi í Tower of London. Haðani skrivaði hann: "Biðið fyri mær. Viðhvørt eri eg so ræddur, at eg havi bestan hugin at krúpa niður í eina músaholu." Men hesin sami Latimer fór hugreystur upp á bálið, sum bíðaði honum í Oxford, og segði við vinin Nicholas Ridley: "Vit skulu í dag av Guds náði festa í ein kyndil í Onglandi, sum eg vænti aldri verður sløktur."

Øll kunna gerast bangin, ein og hvør kann fáa bestan hugin at krógva seg í eini músaholu. Men Gud gevur ta megina, sum okkum tørvar til at møta eini og hvørjari støðu. Hava vit tann rætta óttan fyri Gudi og sannleika hansara, nýtist okkum ikki at stúra fyri nøkrum øðrum.

Jesus segði: *"Vinir mínir, óttist ikki teir, sum sláa likamið í hel, og so ikki longur eru mentir at gera nakað meir."* (Luk. 12,4).

# Hetta heldur Gud um teg

*" ... tú ert mær dýrmætur, mikilsverdur og kærur." Jes. 43,4.*

Um tú stríðist við undirlutakenslu, er tað ikki vist, at tínar kenslur broytast, um tú fert undir at biðja longri bønir, at arbeiða harðari ella gevur tað lyftið, at tú skalt gera alt betri. Tað er sum at umbyggja eini gomul hús á einari ridlandi grund. Tú kanst mála øll rúmini, men gólvini og loftini fara framhaldandi at sjúnka, til alt at enda fellur saman. Tú ert noyddur at taka tær av grundini! Fyri at gera tað, mást tú byrja við tær sjálvum, sum Gud sær teg. Ikki fyrr enn tá, kemur tú at uppliva tað støðufesti og ta trygd, tú saknar.

Veitst tú yvirhøvur, hvat ið Gud meinar um teg? Hann sær teg sum: 1) Verdur at elska " ... tú ert mær dýrmætur, mikilsverdur og kærur (t.e. eg elski teg). Óttast ikki, tí at eg eri við tær!" Jes. 43,4-5. Á, tann váttan! Bíblian sigur: "Tann, Harrin elskar, býr ekkaleysur allar dagar, hin hægsti verjir hann ..." 5. Mós. 33,12. Á, tann trygd!

2) Virðismikil. Um tú ert vaksin upp við tí kensluni, at tú ert óynsktur, so ert tú skeivt kunnaður. Gud staðfesti títt virði á krossinum: "...Guds sonur, sum elskaði meg og gav seg sjálvan upp fyri meg." Gal. 2,20. Eitt av slagorðunum á postkortunum hjá Hallmark ljóðar: "Send tað besta, um tú elskar nóg mikið." Tað gjørdi Gud fyri teg við krossfestingini.

3) Dugnaligur. Skikkaður. Um tú ikki ert vaksin upp, har fólk hava stuðlað tær, so kann tað enda við, at tú hevur eina kenslu av ikki at evna ella megna nakað. Tað fær teg at bøta fyri tað á tann hátt, at tú arbeiðir meir, enn tey vænta av tær. Men Gud veit, hvat ið tú megnar, tí hann hevur givið "... einum og hvørjum sína náðigávu ..." 1. Pæt. 4,10. Harumframt hevur tú "... saman við Kristusi ... fingið sæti ... í Himli." Ef. 2,6. So verð tú sitandi fastur í saðlinum og lat ongan siga tær, at lív títt er týdningarleyst. Títt lív hevur týdning, tí tað sigur Gud!

"… et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

2,6 mill. menniskju hava enn ikki hoyrt um Jesus. Tá ið eg í sjónvarpinum síggi vanlukkur, jarðskjálvtar, kríggj og fólk í túsundatali doyggja, tá hugsi eg altið: Hvagar fara hesi? Latið okkum saman gera tað, sum Jesus segði, vit skuldu gera: Farið út um allan heimin og kunngerið gleðiboðskapin.

*e.c.* ums.

# Lovaður Harrin veri

*Lovaður Harrin veri, dag eftir dag hann okkum ber, tann Gud, ið er frelsa vár. Sela.*
*Sálmur 68,20.*

Sum vit eru sein at lova og prísa Harranum! Tá ið vit fylgja Ísrael ígjøgnum oyðimørkina, lesa vit ferð eftir ferð um gremjan teirra; men lovsongurin hoyrist sjáldan.

Og tó! Bar Harrin tey ikki trygg sum á arnarveingjum? Og hevur ikki miskunn hans verið uppaftur størri ímóti mær? Hvat annað hevur hann gjørt enn at leggja náði á meg dag eftir dag!

Ja, náði, um enn tað mangan tykist sum vreiði. Bara náði, hvussu beiskt og tungt tað enn hevur verið at kent. Í himlinum skal tað alt einaferð við tøkk verða skilt til fulnar. Gud mín, kom framvegis við náðibyrðu tíni, bæði tá ið tú revsar og tá ið tú uggar!

*Tann ogn, sum mín er vorðin*
*við Kristi dýra blóð,*
*í dópinum mær borin,*
*bert hon er føst og góð;*
*hon hvílir í Guds hjarta, -*
*og á tað gávubræv,*
*úr krossins myrkri svarta*
*Guds sonur okkum gav.*

*t.* týddi.

---

Úti í Guds víngarði skulu vit gera tað, vit eru sett til og hava fingið evni til - og ikki alt tað, vit ikki eru sett til.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 4. okt. | Tekstur: | Matt.6,11-33 og 2. Mós. 16,1-36; | bíbliuorð: | Matt.6,33 |
| 11. okt. | Tekstur: | Matt. 6,12 og 18,21-35; | bíbliuorð: | Ef.4,32b |
| 18. okt. | Tekstur: | Matt. 6,13a og 4,1-11; | bíbliuorð: | 2.Tess.3,3 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheygggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74